## Brúkarating
## í Norðurlandahúsinum
## mánakvøldið 24. mars kl. 19.30

**Almennur fundur við danska brúkaraumboðsmannin og pallborð við umboðum fyri brúkarar, vinnuna, landsstýrið og politisku flokkarnar**

Brúkaraumboðsmaðurin í Danmark, Hagen Jørgensen, fer at greiða frá praktiska týdninginum av danskari brúkaralóggávu, samanbera við norðurlendsk og altjóða viðurskifti, og harumframt greiða frá sínum luti sum brúkaraumboðsmaður í Danmark.

Hereftir fáa umboð fyri brúkaran, vinnuna, landsstýrið og politisku flokkarnar høvi at framføra síni sjónarmið um hetta evnið:
**Er brúk fyri nýggjari brúkaralóggávu og brúkarastovni í Føroyum? Og hvussu kunnu vit skipa brúkaravernd í Føroyum?**

Forkvinnan í Brúkarasamtakinum, Ingun Simonsen, setir fundin
Fundarstjóri verður Turid Debes Hentze, advokatur

Við pallborðið verða luttakararnar:
Brúkarasamtakið: Hans Pauli Strøm, skrivari
Vinnuhúsið: Jan Mortensen, stjóri
Landsstýrismaður í vinnumálum, og umboð fyri
Fólkaflokkin: Bjarni Djurholm
Sambandsflokkurin: Alfred Olsen, løgtingsmaður
Javnaðarflokkurin: Kristian Magnussen, løgtingsmaður
Sjálvstýrisflokkurin: Kári P. Højgaard, løgtingsmaður
Tjóðveldisflokkurin: Finnur Helmsdal, løgtingsmaður
Miðflokkurin: Álvur Kirke, floksformaður

Vónandi møta fólk fjølment, so brúkarar kunnu nýta hetta høvið at koma til orðanna og gera vart við støðu okkara og tey krøv, sum mugu setast fyri at bøta um viðurskiftini hjá brúkarum í Føroyum
Nýggir limir kunnu tekna seg.

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
**Postsmoga 165 - 110 Tórshavn**

## Fundur um ES og støðu okkara til ES

Í framhaldi av floksleiðslufundinum fyrrapartin verður fundur fyri øll javnaðaráhugað

**leygardagin 22. mars 2003 kl. 14.00**

í hølum Føroya Arbeiðarafelags,
Tjarnardeild 5–7, Tórshavn

Framløga verður um ES, um bygnaðarligu viðurskiftini í ES, um fiskivinnupolitikkin hjá ES, og um støðu Føroya til ES, sum hon er í dag.

Síðani verður orðaskifti um ES-málið.
Øll javnaðaráhugað eru vælkomin.

**Javnaðarflokkurin**

KIRKJUBØAR KOMMUNA

## Kunngerð

**um framløgu av víðkan av byggisamtyktini fyri Kirkjubøar kommunu**

Sambært løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum verður við hesum gjørt kunnugt, at broytingar í byggisamtykt/býarskipan fyri Kirkjubøar kommunu verða lagdar fram til almenna eftirskoðan í Sólarmagn á Velbastað, hvønn gerandisdag frá kl. 15.00 til 18.00, frá 19. mars 2003 til og við 9. apríl 2003 báðar dagar íroknaðir.

**Víðkanin av verðandi byggisamtykt fevnir um hesi øki á Velbastað, sum verða løgd út til sethúsøki merk við B :**
Partar av matr.nr. 51a og matr.nr. 5a, omanfyri ervavegin, frá telefonhúsinum norður til Hvíthjallar, verður lagt út til sethúsaøki.

Partar av matr. nr. 5a, 4a, 23a, 24 og 43d, frá Stórheyggi og norður til og við Bøllubrekku, millum bygdavegin og bøgarðarnar, verður lagt út til sethúsaøki.

Partar av matr.nr. 50a, 3a, 1a, 3d, 2a, 41a og 4a, sum er øki norðan fyri Ovara Roykheygg, millum vegin norður til Barnagarðin og landsvegin til Syðradals norður til Mígandalsá, verður lagt út til sethúsøki.

**Hesi øki verða løgd út til Almenn Frítíðarøki, merkt við F :**
Økið millum bøgarðin og landsvegin, burtur av matr.nr. 51a niðan fyri Hvítthjallar.
Økið millum landsvegin og vegin inn til Bøllubrekku, burtur av matr. nr. 50a.
Ovari Roykheyggur og nakað norður undir vegnum til Barnagarðin, burtur av matr. nr. 50a.
Økið niðanfyri matr. nr. 50æ, burtur av matr. nr. 50a.

**Hesi øki verða løgd út til Almennar Stovnar merkt við E :**
Partur av matr. nr. 50a, økið niðanfyri Sandheygg.
Partur av matr. nr. 50a, økið sunnanfyri Mígandalsá, millum landsvegin til Syðradals og sethúsini niðanfyri Barnagarðin.

**Hesi øki verða broytt frá H øki til J øki:**
Matr.nr. 2a Norðuri á Fløtum verður broytt frá H øki til J øki.

**Víðkanin av verðandi byggisamtykt fevnir um hesi øki í Kirkjubø.**
Partur av matr.nr. 21a í Kirkjubø.

Víst verður annars til framløgdu víðkanina av byggisamtykt hjá Kirkjubøar Kommunu, sum er galdandi fram til 31/12-2009.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot, ið skulu vera skrivlig, mugu verða kommunustýrinum í hendi í seinasta lagi 11/6-2003.

**Kirkjubøar Kommuna**
FO-176 Velbastaður

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3520
**Navn:** Sp/f Frá 12. mars 2003
**Adressa:** Torfinsgøta 45, 100 Tórshavn

**Kommun**a: Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 12.03.2003
**Viðtøkudato:** 12.03.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur: :** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Árni Bech Jensen, Torfinsgøta 45, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Árni Bech Jensen, Torfinsgøta 45, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari:** : P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 12.03.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handil, umsiting og útleigan og annað starv í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 20. mars 2003*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3522
**Navn:** Sp/f Byggitilfar
**Adressa:** Hákunargøta 18, 188 Hoyvík

**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 17.03.2003
**Viðtøkudato:** 17.03.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** H.W.K. Holding ApS, Mågevej 6, DK-8240 Risskov, Benny Larsen, Millum Gilja 155, 188 Hoyvík og Harald Winther Knudsen, Hákunargøta 18, 188 Hoyvík.
Stjórn: Harald Winther Knudsen, Hákunargøta 18, 188 Hoyvík.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum.
**Grannskoðari:** : Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 17.03.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at keypa og selja byggitilfar og aðrar vørur umframt annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 20. mars 2003*
*Kristin Balle*

---

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo



## Stuðulsfólk

Søkt verður eftir 1 stuðulspedagogi til 4 ára gamalt barn í Klaksvík at byrja 15. apríl.

Arbeiðið hjá stuðlinum verður at stimbra barninum málsliga.

Arbeiðið er í tøttum samstarvi við familjuna, talupedagogin og barnagarðin.

Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna og er fyribils til 15. oktober.

Ynskiligt er at tann, ið settur verður, hevur hóskandi fakliga útbúgving ella royndir.

Setan sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jóruna Niclasen, stuðulsráðgeva, tlf. 410000.

Umsóknir saman við møguligum prógvi verða at senda til:

**Barnaverndarnevndina**
**Klaksvíkar Kommuna**
**Postboks 2**
**FO 700 Klaksvík**

í seinasta lagi 8. apríl.

**Suðuroyar Ellis- og Røktarheim**
**800 Tvøroyri**

## Húsavørður

Søkt verður eftir frítíðaravloysara fyri húsavørð í tíðarskeiðnum 1. august til 31. august 2003.

Starvið umfatar alt fyrifallandi inni- og útiarbeiði. Starvið umfatar eisini smærri umvælingar, og er tað tí ein fyrimunur at umsøkjarin hevur handverkaraútbúgving. Somuleiðis er tað eitt ynski at viðkomandi hevur koyrikort.

Løn sambært sáttmála millum Fríggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til fyristøðukvinnuna á tlf. 37 16 66 lokal 147.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um starvsroyndir verða at senda til

**Suðuroyar Ellis- og Røktarheim**
Fyristøðukvinnan
800 Tvøroyri

**Umsóknarfreist 15. apríl 2003.**

## Kunningarfundur

**Granskingarráðið, Menningarstovan og TK Stovan skipa í felag fyri Kunningarfundi um 6. rammuætlanina í ES**

**Mánadagin 31. mars 2003 á Hotel Føroyum**

Endamálið er at kunna um 6. rammuætlanina og at greiða frá, hvørjar møguleikar og avmarkingar eru fyri føroyskari luttøku í rammuætlanini. Eisini verður høvi at seta fram spurningar og kjakast um 6. rammuætlanina.

Høvuðsendamálið við 6. rammuætlanini er at fremja samskipan og samstarv í gransking, menning og nýskapan í Evropa. Somuleiðis er endamálið við rammuætlanini at styrkja kappingarføri í evropiska búskapinum. Øki, ið 6. rammuætlanin fevnir um, eru m.a. “life siences”, biotøkni fyri heilsu, matvørugóðska, matvørutrygd og burðardygg menning.

Av tí at Føroyar onga avtalu hava við ES á hesum økinum, eru vit ikki beinleiðis partur av 6. rammuætlanini hjá ES. Føroysk virkir og stovnar kunnu kortini undir serligum treytum taka lut í rammuætlanini.

Kunningarfundurin er ætlaður (størri) virkjum, stovnum og einstaklingum, ið arbeiða við gransking og menning og annars teimum, ið eru áhugað í 6. rammuætlanini.

Tilmelding á TK Stovuni, tlf. 317366, faks 319363 ella teldupost tk@tk.fo. Kostnaðurin er 300,- uttan mvg og tilmeldingarfreistin er fríggjadagin 28. mars.

**Skrá:**

| | |
|---|---|
| **13.00** | **Vælkomin og innleiðing** |
| **13.10** | **Kunning um 6. rammuætlanina**<br>v/Marjon Boelskov<br>Endamálini við 6. rammuætlanini<br>Øki og vinnugreinar, ið rammuætlanin fevnir um og royndirnar higartil |
| **13.30** | **Støðan hjá Føroyum**<br>**Møguleikar og avmarkingar fyri føroyskari luttøku**<br>v/Marjon Boelskov<br>Møguleikarnar hjá 3. londum at taka lut<br>Krøv til virkir og stovnar, ið taka lut |
| **14.20** | **Steðgur** |
| **14.30** | **Hvussu ber til at taka lut sum føroyskur partnari**<br>v/Marjon Boelskov<br>Umsóknir og mannagongdir í sambandi við luttøku |
| **14.50** | **Royndir hjá føroyskum luttakararum í 6. rammuætlanini**<br>Bogi Hansen og Pál Weihe greiða frá sínum roundum av at taka lut í 6. rammuætlanini |
| **15.30** | **Aftaná 2006 – 7. rammuætlanin?** |
| **15.45** | **Spurningar og kjak** |

Virkisnavn: ______________________ Tal á luttakarum: __________

Navn/nøvn: ______________________________________

_________________________________________________

Tel.: ______________________ Faks: __________

TK Stovan menningarstovan Faroe Islands Trade Council granskingarráðið The Faroese Research Council

**TK Stovan**
Niels Finsens gøta 37, FO-100 Tórshavn
**Tel** +298 317366, **Faks** +298 319363
tk@tk.fo
www.tk.fo

Sosialurin Bilar Lýsingar Tíðindi Viðmerkingar Ítróttur Nøvn

Sosialurin